*Frá síðulinjuni inn á vøllin:*

# Mærsk vil vera við í oljuleiting við Føroyar

*Stóra danska fyritøkan Mærsk Olie og Gas, sum higartil hevur verið rættiliga varin og avvísandi, tá tað hevur snúð seg um at vísa føroysku undirgrundini ans, tykist nú hava skift kós. Sambært danska blaðnum Børsen hevur Mærsk gjørt av at vera við í einum oljusamtaki, ið hevur fyri eygað at vera við í fyrstu útbjóðingarumfarinum á føroyskum øki.*



Jan Muller

Tvær ferðir tey seinastu fýra árini hevur leiðslan í Mærsk Olie og Gas gjørt vart við støðu sína í sambandi við leiting eftir olju og gassi á føroyskum øki.

Varastjórin í fyritøkuni segði við Sosialin í 1993 og aftur fyri í ár, at Mærsk hevði ongar ætlanir um at vera við í leiting eftir olju og gassi í Føroyum.

Men víst varð um somu tíð á, at fyritøkan fylgdi við, hvat hendi á økinum og vildi taka støðu til luttøku tá og um hetta var hildið ráðiligt.

Nú hevur henda risastóra danska oljufyritøkan, ið bert er ein av mongum fyritøkum hjá stóra AP Møller samtakinum, gjørt av at skifta kós og vísa føroyska økinum veruligan áhuga.

Hetta vera byrjanin [illegible] samarbeiði, sum Mærsk er farið upp í saman við fleiri øðrum oljufeløgum, sum longu eru virkin í føroysk um øki.

Hesi feløgini eru tað belgiska Fina Petroleum, sum er operatørur, Denminex UK Oil and Gas og Union Texas Petroleum.

Avtalan millum oljufeløgini snýr seg um at meta um møguleikarnar fyri olju og gassi í føroyska landgrunninum og somuleiðis um møguliga at lata inn umsókn um rættin til at leita eftir olju, tá fyrsta føroyska útbjóðingarumfarið verður um ikki so langa tíð.

Um tað so verður til at nakað at senda inn umsókn fer tíðin at vísa. Enn er so einki avgjørt.

**Mærsk váttar**

Bo Wildfang, varastjóri í Mærsk Olie og Gas váttar fyri Børsen, at Mærsk er við í umrødda samstarvi, men leggur eina við, at hetta ikki nýtist at merkja, at Mærsk verður við í komandi útbjóðingarumfarinum.

Mærsk Olie og Gas hevur annars verið sera afturhaldandi í sambandi við leiting eftir olju og gassi við Føroyar. Tað hevur havnað støðið úti á síðulinjuni og eygleitt gongdina, men má nú sigast at vera komið við á liðið, sum skal til at byrja veruliga leiting.

Tá oljufyrisitingin beyð meira enn 45 oljufeløgum at vera við á kunnandi fundinum um boringina í Lopra varð Mærsk eisini boðið og møtti. Men tá avgjørt varð, vildi Mærsk ikki vera við í projektinum. Hetta hevði rætt og slætt ikki áhuga fyri feløgini, sum annars er sera virkið kring allan heimin.

Av teimum fýra feløgunum, sum nú hava skipað hetta nýggja samtakið eru tvey við í Lopra. Tey eru Fina og Denminex.

Eitt annað av feløgunum hjá AP Mølller, Mærsk Contractors stendur fyri sjávarboringini í Lopra.

# Føroya Oljuídnaður fund við Stoltenberg

*Vilja økja samvinnuna á oljuøkinum*

Jan Muller

Seinasta fríggjadag var fundur millum Thorvald Stoltenberg og Paula Einarson, Johan Mortensen og Magna Arge fyri Føroya Oljuídnað.

Fundurin var komin í lag eftir initiativi frá Føroya Oljuídnaði.



Á fundinum fekk Thorvald Stoltenberg at vita, hvat Føroya Oljuídnaður læst við og um samstarvið, sum longu er millum Føroyar og Noreg á oljuøkinum.

Thorvald Stoltenberg var áhugaður fyri at økja hetta samstarv.

Føroya Oljuídnaður nýtti høvið at heita á hann um at fáa vitjan í lag av norska oljumálaráðharranum, kanska saman við norskum vinnulívsmonnum.

Hetta dámdi Thorvaldi Stoltenberg væl og fer Føroya Oljuídnaður nú at heita á Edmund Joensen, løgmann, um formelt at bjóða norska oljumálaráðharranum hendavegin.

Á fundinum var eisini nevndur møguleikin at fáa betri flogsamband við Noreg og skuldi Stoltenberg eisini kanna hetta.

Samanumtikið ein góður fundur.



at taka tað roliga
rff